GRAFIA

# DÁTUVIÐGERÐARAVTALA

Versión 1.3 – mars 2026



## STANDARDÁSETINGAR

sbrt. § 43 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin)

millum

## DÁTUÁBYGDARI:

| | |
|---|---|
| Navn á kunda | |
| V-tal | |
| Gøta | |
| Bygd/býður | |
| Land | |

eftir hetta „dátuábyrgdarin"

og

## DÁTUVIÐGERÐI:

**GRAFIA Sp/f**
V-tal: 635537
Húsgarður 3
FO-513 Syðrugøta
Føroyar

eftir hetta „dátuviðgerin",

sum hvør sær eru „partar" og saman eru „partarnir",

hava avtalað fylgjandi standardásetingar fyri at fylgja reglunum í dátuverndarlógini.

# 1. INNLEIÐSLA

1. Hendan avtalan avger rættindi og skyldur hjá dátuviðgeranum, tá ið dátuviðgerin viðger persónupplýsingar fyri dátuábyrgdaran. Avtalan er gjørd, soleiðis at partarnir samstundis lúka treytirnar í § 41, stk. 2 í dátuverndarlógini.

2. Í sambandi við framleiðslu, viðlíkahald og hýsing av heimasíðuni viðger dátuviðgerin persónupplýsingar vegna dátuábyrgdaran í samsvari við hesa avtalu.

3. Ásetingarnar í hesi avtalu ganga framum møguligar aðrar avtalur millum partarnar, sum hava líknandi ásetingar. Hendan avtala gongur ikki framum skyldur, sum dátuviðgerin hevur ella er álagdur eftir dátuverndarlógini ella aðrari løggávu. Ásetingar í avtaluni skulu tulkast til fyrimuns fyri vernd av rættindum hjá tí einstaka.

4. Avtalan skal vera til taks skrivliga, undir hesum elektroniskt, hjá báðum pørtum.

# 2. DÁTUVIÐGERIN GER EFTIR BOÐUM

1. Dátuviðgerin kann einans viðgera persónupplýsingar eftir skjalfestum boðum frá dátuábyrgdaranum.

2. Dátuviðgerin viðger persónupplýsingar fyri dátuábyrgdaran á henda hátt: Dátuviðgerin viðger persónupplýsingar vegna dátuábyrgdaran sambært skrivligum boðum frá dátuábyrgdaranum.

   Dátuábyrgdarin áleggur dátuviðgeranum at viðgera tær persónupplýsingar, sum eru neyðugar í sambandi við menning, hýsing, viðlíkahald og rakstur av heimasíðuni.

   Endamálið við viðgerðini er at tryggja støðugan, tryggan og virknan rakstur av heimasíðuni, herundir at tryggja, at heimasíðan riggar á besta hátt, og at villur og avbjóðingar verða handfarnar.

   Viðgerðin fer fram á skrivstovuni hjá GRAFIA, Húsgarður 3, FO-513 Syðrugøta, Føroyar og/ella umvegis fjarsamband. Harumframt kann viðgerð fara fram hjá góðkendum undirveitarum, sum dátuviðgerin nýtir sambært avtalu og við undangóðkenning frá dátuábyrgdaranum, sbrt. § 43, stk. 2 í Dátuverndarlógini.

   Dátuviðgerin kann flyta upplýsingar til undirdátuviðgera í Danmark/EU og Ísrael í sambandi við framleiðslu, viðlíkahald og hýsing av heimasíðuni. Flutningurin er í samsvari við § 60 í dátuverndarlógini, og kunngerð nr. 175/2020 um triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðvíkjandi flutningi av persónupplýsingum.

3. Dátuviðgerin boðar alt fyri eitt dátuábyrgdaranum frá, um dátuviðgerin metir, at eini boð frá dátuábyrgdaranum eru í ósamsvari við galdandi lóggávu.

4. Dátuábyrgdarin kann til eina og hvørja tíð geva dátuviðgera boð um fyribils at steðga viðgerð, um dátuábyrgdarin metir, at dátuviðgeri ella undirdátuviðgeri ikki viðger í samsvari við dátuverndarlógina ella hesa avtalu.

## 3. UNDIRDÁTUVIÐGERÐ

1. Tá ið dátuviðgerin nýtir undirdátuviðgera, skal dátuviðgerin í bindandi avtalu áleggja undirdátuviðgera at halda somu skyldur, sum eru álagdar dátuviðgeranum í hesi avtalu.

2. Avrit av viðkomandi ásetingum í avtalu við undirdátuviðgera og broytingar í hesum avtalum skulu eftir umbøn sendast dátuábyrgdaranum.

3. Í avtaluni við undirdátuviðgera skulu eisini vera ásetingar um at tryggja rættindi hjá dátuábyrgdaranum og skrásetta, í fall dátuviðgerin ella onnur millumlið fara á húsagang.

4. Dátuviðgerin hevur fulla ábyrgd mótvegis dátuábyrgdaranum av, at skyldurnar í hesi avtalu verða hildnar, sjálvt um tað er undirdátuviðgeri, sum ikki heldur sínar skyldur. Ábyrgdarbýti ávirkar ikki rættindini hjá teimum skrásettu sambært dátuverndarlógini, undir hesum t.d. § 77 um endurgjald.

Góðkendir undirdátuviðgerar. Tá avtalan kemur í gildi hevur dátuábyrgdarin góðkent hesar undirdátuviðgerar

| | | | |
|---|---|---|---|
| Wix.com ltd | 6350671 | 40 Namal, Tel Aviv St. Tel Aviv, Israel | Platformur og hýsing av heimasíðuni. |
| Meta (Facebook og Instagram) | IE550858 | Merrion Road, Dublin 4, Ireland | Marknaðarførsla og samband við kundar. |
| Shopify | IE-3347697KH | Victoria Buildings, Haddington Road, Dublin, Ireland | Platformur og hýsing av heimasíðuni. |

Tá avtalan kemur í gildi hevur dátuábyrgdarin góðkent hesar undirdátuviðgerðar til lýstu viðgerðir. Dátuviðgerin kann ikki uttan skrivligt loyvi frá dátuábyrgdaranum nýta ein undirdátuviðgera til eina aðra viðgerð enn hana, sum er lýst, ella nýta ein annan undirdátuviðgera til lýstu viðgerðina.

## 4. TRYGD OG TRÚNAÐUR

1. Dátuviðgerin skal – óheft av dátuábyrgdaranum – meta um váðarnar við viðgerðini fyri tann skrásetta og seta í verk hóskandi tiltøk. Dátuábyrgdarin skal í tí sambandi veita dátuviðgeranum allar viðkomandi upplýsingar, so at dátuviðgerin er førur fyri at eyðmerkja og meta um váðan.

2. Viðgerðin fevnir um eina smærri mongd av persónupplýsingum, sum eru allýstar í § 6, stk. 1 í dátuverndarlógini og umfata av ásetingunum í §8 um viðgerð av vanligum persónupplýsingum, og tí skal trygdarstøðið vera í samsvar við tað.

Dátuviðgerin hevur heimild og skyldu til at gera av, hvørji tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, skulu setast í verk fyri at tryggja hóskandi trygdarstøði, sum er í samsvari við hesa avtalu.

Dátuviðgerin skal fremja hesi tiltøk, sum eru avtalað við dátuábyrgdaran:

- Passorð við loyniorði skal tryggja at óviðkomandi ikki fáa óheimilaða atgongd til skipanina, sum kunnu ávirka trúnaðin, atkomuna og integritetin í upplýsingunum.

3. Dátuviðgerin skal viðgera allar persónupplýsingarnar frá dátuábyrgdaranum í trúnaði. Dátuviðgerin skal syrgja fyri, at starvsfólk hjá dátuviðgeranum, undirdátuviðgera og onnur hava bundið seg til trúnað ella eru bundin av hóskandi lógarásetingum um trúnað. Hesir persónar fáa bert atgongd til persónupplýsingarnar, um tað er neyðugt.

4. Listi yvir persónar, sum hava atgongd til persónupplýsingarnar, skal vera atkomuligur hjá dátuábyrgdara og gjøgnumgangast við jøvnum millumbili.

## 5. AT HJÁLPA OG STUÐLA DÁTUÁBYRGDARANUM

1. Dátuviðgerin skal hjálpa dátuábyrgdaranum m.a. við at veita dátuábyrgdaranum upplýsingar um tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum eru sett í verk, og aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at dátuábyrgdarin er førur fyri at halda sínar skyldur sbrt. §§ 46-52 í dátuverndarlógini og svara umbønum, sum skrásett seta fram sbrt. kapittul 4 í lógini.

2. Dátuviðgerin skal geva dátuábyrgdaranum allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vísa á, at §§ 41 og 42 í dátuverndarlógini og henda avtala verða hildnar, og skal fáa í lag og hjálpa til við skoðan, undir hesum kanningum, sum dátuábyrgdarin sjálvur ella triðipartur, sum er heimilaður av dátuábyrgdaranum, fremur.

3. Dátuviðgerin skal uttan óneyðugt drál og skjótast gjørligt boða dátuábyrgdaranum frá eftir at vera vorðin kunnugur við, at viðgerð ikki er í samsvari við dátuverndarlógina ella avtaluna.

## 6. AT LATA AFTUR OG STRIKA UPPLÝSINGAR

1. Tá ið viðgerðin hjá dátuviðgeranum er endað, hevur dátuviðgerin og undirdátuviðgeri skyldu at lata persónupplýsingarnar aftur og strika øll avrit, um tað ikki er álagt í lóggávu at goyma persónupplýsingarnar. Váttan um hetta skal latast dátuábyrgdara.

## 7. GILDISKOMA OG GILDISSLIT

1. Avtalan kemur í gildi tann dagin báðir partar skriva undir.

2. Báðir partar kunnu hvør sær krevja nýggjar samráðingar um ásetingarnar, um lógarbroytingar ella óskynsemi í avtaluni ger seg galdandi.

3. Avtalan er galdandi so leingi dátuviðgerin skal viðgera persónupplýsingar fyri dátuábyrgdaran. Í hesum tíðarskeiði kann henda avtalan ikki sigast upp, uttan so at aðrar ásetingar, sum snúgva seg um viðgerðina av persónupplýsingum, verða avtalaðar millum partarnar.

4. Er viðgerðin av persónupplýsingum endað, og upplýsingar eru latnar aftur ella strikaðar sbrt. pkt. 6, kann avtalan sigast upp av báðum pørtum hvør sær við skrivligum varningi á 12 vikur.

## 8. UNDIRSKRIFTIR

**Dátuábyrgdarans vegna**

| | |
|---|---|
| Navn | |
| Starv | |
| Telefonnummar | |
| Teldupostur | |

Dagf.      Undirskrift

**Dátuviðgerans vegna**

| | |
|---|---|
| Navn | Anna Simonsen |
| Starv | Stjóri |
| Telefonnummar | +298 718192 |
| Teldupostur | anna@grafia.fo |

11/3 - 2026

Dagf.      Undirskrift